# Føroya Kolvetni og Sagex í hornatøkum

**Norska oljufelagið Sagex Petroleum, sum í 2000 fór í samarbeiði við føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni, hevur nú stevnt fyrrverandi samstarvspartnaran fyri rættin eftir milliónum av krónum og eini rúgvu av partabrøvum. Stjórin í Sagex, Terje Hagevang sigur, at Føroya Kolvetni rennur undan rokningini fyri arbeiðið teir gjørdu og sum tryggjaði føroyska felagnum luttøku í loyvinum hjá Agip. Tað ætlar teir sær ikki at góðtaka**

OLJUFELØG OG SAKARMÁL
*Jan Müller*



*Tá samarbeiðsavtalan millum Føroya Kolvetni og Sagex varð kunngjørd í februar 2000. Á myndini umboð fyri bæði feløgini*
*Mynd Jan Müller*

Hvør minnist ikki tann góða hýrin og brosandi andlitini, tá umboð fyri Føroya Kolvetni og norska felagið Sagex Petroleum hittu pressuna í hølunum hjá Føroya Kolvetni, har Fossbankin fyri helt til, fyri at greiða frá tí nýggja og spennandi samstarvinum teirra millum – eitt samstarv, sum hevði til endamál at tryggja føroyska oljufelagnum ein týðandi leiklut í fyrstu leitingini á landgrunninum.

Sosialurin var á staðnum til tess at kunna Føroya fólk um eitt samtarv, ið tóktist at skula fáa stóran týdning fyri føroyska oljufelagið og framtíð tess. At støðan skuldi útvikla seg til eitt eljustríð millum somu feløg kom óvart á, og neyvan hevði nakar tá ímyndað sær, at norska felagið ikki so langa tíð seinni skuldi fara í rættin við sínum fyrrveranda samstarvsfelaga.

Tað lá í kortunum, at samstarvið millum feløgini bæði skuldi gera føroyska oljufelagið ført fyri at fara í samstarv onnur oljufeløg fyri harvið at vera við í 1. útbjóðingini. Úrslitið varð eitt samstarv við Agip. Samstarvið við norska ráðgevandi felagið var eftir øllum at døma so mikið gott, at ein av oddamonnunum hjá Sagex, Terje Hagevang, ið hevur drúgvar royndir á føroyska økinum sum fyrrverandi leitistjóri fyri Saga, varð eisini valdur inn í nevndina í Føroya Kolvetni. Gøtan lá opin og tyktist her verða slóðað fyri einum spennandi og gevandi samarbeiði. Tað skuldi tó vísa seg at blíva øðrvísi. Tí eftir eina tíð saksøkti norska oljufelagið Hydro teir tríggjar Sagexmenninar fyri at hava brúkt týðandi upplýsingar frá teirra tíð í Saga (sum Hydro síðani yvirtók) í arbeiðinum hjá Føroya Kolvetni, sum tá var kappingarneyti hjá Hydro. Tað hevði við sær, at fútaforboð varð reist móti norska felagnum, og hetta gjørdi, at samstarvið millum Føroya Kolvetni og Sagex varð lagt á hillina eina tíð. Eftir fleiri saksviðgerðir við norskan rætt endaði málið tó við, at Hydro og Sagex gjørdu eina semju. Við øðrum vórðu krøvini móti Sagex tikin aftur og felagið fekk stórt endurgjald. Nú skuldi man so hildið, at Føroya Kolvetni og Sagex aftur kundu taka samstarvið uppaftur, men so varð ikki. Hóast Sagexfólkini vórðu fríkend hevði øll henda óhepna tilgongdin við sær, at Føroya Kolvetni ikki ynskti at taka uppaftur samstarvið við Sagex.

Síðani hava feløgini einki havt við hvørt annað at gera, men hava arbeitt hvør sær. Til nýliga, tá eitt mál brádliga stingur seg upp í rættinum í Oslo. Sagex hevur sent rokning fyri arbeiði tað hevur gjørt fyri Føroya Kolvetni til inkasso, sum ljóðar uppá ikki minni enn 3 mill. kr. Haraftrat krevur felagið at fáa 5% av partabrøvunum í felagnum, sum tað sigur seg eiga rætt til sambart avtaluna, og aftrat tí vilja Sagexfólkini vera við, at tey hava krav uppá tað, sum svarar til 20% av komandi tekningini. Føroya Kolvetni góðtekur einki av krøvunum men krevur, at tann partur av sakarmálinum, sum snýr seg um partapeningin verður at ganga í rættinum í Føroyum. Rætturin í Oslo gevur føroyska felagnum viðhald, soleiðis, at talan nú verður um tvey ymisk sakarmál: eina inkassosak í Oslo og eina partafelagssak í Havn.

## Søgdu seint sáttmála upp

Terje Hagevang, stjóri í Sagex sigur í eini viðmerking til málið, at tað var løgið av Føroya Kolvetni at siga upp sáttmálan, eftir at Hydro vildi gera semju. At felagið so ikki hevur viljað goldið eina krónu fyri tað arbeiði, sum gjørt varð, dugir hann heldur ikki at skilja. Og tí fóru hann og hini Sagexfólkini í rættin í Oslo við allari sakini. Hetta hendi fyri umleið 8 mánaðum síðani. Sakin, sum hevur verið fyri í bæði undirrætti og hægri rætti í Oslo, hevur higartil snúð seg um formalia, tvs. hvar hon skal vera hildin, í Oslo ella í Havn. Rætturin í Oslo, Borgarting lagmansrett, kom sum nevnt til ta niðurstøðu, at tann parturin av málinum, sum snýr seg um rokningina fyri gjørt arbeiði, skal fara fram í Oslo, meðan spurningurin um partabrøv skal verða viðgjørdur í føroyskum rætti. Eftir tí sum blaðið skilur kann ganga drúgv tíð, áðrenn hesi bæði málini verða avgreidd.

Terje Hagevang dylur ikki fyri, at teir uppliva støðuna sum at føroyska felagið rennur frá eini rokning. Er tað veruliga so, tá vilja teir einki hava við Føroya Kolvetni at gera longur men fara at krevja sín fulla rætt sambart sáttmálan við føroyska felagið.

## Norsk Hydro ábyrgdina

Vit spurdu stjóran í Sagex, um ikki tað stríðið, sum tók seg upp millum Hydro og Sagex í veruleikanum gav føroyska felagnum stórar trupulleikar og skaddi felagið!

Til tað sigur hann, at teir kundu ikki forða Norsk Hydro at fara í rættin við teimum. Tað var ikki við teirra góða vilja, at stóra norska oljufelagið fekk steðgað teirra arbeiði við einum fútaforboð.

– Tað var Norsk Hydro, sum saksøkti okkum, og tá vit jú vórðu fríkendir, kann tað ikki vera rætt at leggja nakra ábyrgd á okkum. Um Føroya Kolvetni meinar, at tað eru vit sum skylda teimum nakað t.d pengar fyri ikki at hava kunnað latið eina vøru, so mugu teir saksøkja Hydro, tí tað var Norsk Hydro, sum setti alt hetta í gongd.

Terje Hagevang sigur, at um Føroya Kolvetni tann dagin, tá rætturin í Oslo gav Sagex fútaforboð, hevði sagt upp avtaluna, so hevði tað verið øðrvísi. Men tað gjørdu teir ikki. Seinni vann Sagex í hægri rætti og eftir tað vildi Hydro hava eina semju. Ikki fyrr enn eftir tað segði Føroya Kolvetni upp sáttmálan.

## Ein stórur trupulleiki

Terje Hagevang sigur seg skilja, at Føroya Kolvetni skal til at víðka sín partapening. Hann heldur tí eisini, at teir, sum tá ætla sær at seta pengar í felagið, mugu gera sær greitt, at tað er óvist, hvussu stórur partur av felagnum er frítt umsetiligur, tí Sagex Petroleum hevur krav uppá ein part av Føroya Kolvetni. Teir halda eisini, at teir hava krav uppá at vera við til víðkanina av partapeninginum við 20%.

– Hví 20%?

– Tí tað stendur í eini avtalu vit hava við Føroya Kolvetni, at næstu ferð teir skulu hækka partapeningin hava vit rætt til at keypa 20%. Tað átti ikki at verið ein trupulleki fyri Føroya Kolvetni, tí tá hava teir eitt felag, sum kennir oljubransjuna, og sum eigur pengar, og sum vil seta teir í FK. Tað burdi bara verið ein fyrimunur fyri teir.

Annars heldur Terje Hagevang tað vera løgið at kalla seg føroyskt felag, tá felagið í veruleikanum er skrásett á oynni Guernsey, og har eingin veit, hvør eigur meginpartin av peninginum í tí. Orsakað av serligu viðurskiftunum á Guernsey fær tú heldur ongar upplýsingar um eigaraviðurskiftini, og tað heldur fyrrverandi nevndarlimurin í Føroya Kolvetni vera sera óheppið.

– Fyri at Føroya Kolvetni kann vera við í leitingini næsta ár so mugu teir útvega fleiri pengar og vit, sum vilja seta pengar í Føroya Kolvetni vilja hava vita, hvussu støðan er í felagnum. Eg gangi út frá, at teir vilja siga, at vit bara skaptu teimum trupulleikar og tí skylda teir okkum heldur einki. Men vit hava eina avtalu at vísa á. Terje Hagevang undirstrikar, at úrslitið av tí arbeiði teir gjørdu var, at Føroya Kolvetni slapp uppí tvey loyvi.

– Hava tit ikki verið ov alt ov grátigir?

– Nei avgjørt ikki. Áðrenn vit fóru at arbeiða fyri Føroya Kolvetni var tað eingin, sum hevði hoyrt nakað serligt um felagið, til vit fóru undir at útvikla tað, fingu tað á føtur og gjørdu eina strategi og profil fyri felagið. Er nakar grátigur, so er tað onkur annar, sum situr aftanfyri og stýrir. Og hesir eru kanska bangnir fyri at missa part av eigaraskapinum í felagnum. Tí vilja teir eftir øllum at døma einki hava við okkum at gera.

Δ

## Stór krøv

Góðar 3 mill. kr. í reiðum peningi. 5% av verandi partabrøvum og 20% av partabrøvunum, tá nýggj tekning verður. Hetta eru krøvini, sum norska oljufelagið Sagex Petroleum, fer í rættin við við føroyska oljufelagnum Føroya Kolvetni. Føroyska felagið hevur higartil ikki viljað góðtikið krøvini uttan víðari, og tí er avgjørt, at sakarmál skal vera bæði í Oslo og í Havn.

Hetta hendir um sama mundið sum føroyska oljufelagið ger klárt til at fara undir at bora á føroyskum øki. Og til tess at kunna halda síni forpliktilsi í samtakinum, ið bora skal, má Føroya Kolvetni hava meiri kapital. Ætlanin var at fara á Londonbørsin í heyst men hetta er vorðið útsett til í ár.

Nú er so spurningurin, hvussu og um eitt sakarmál kann ávirka bæði partafelagstekningina og støðuna annars hjá felagnum í samtakinum, har italska oljufelagið Agip er fyristøðufelag (operatørur). Føroya Kolvetni hevur sum er 7% part í lisensinum og hevur møguleika at hækka sín part til 22%. Men fyri at kunna tað skal felagið hava nógv fleiri pengar. Og tí ætlar tað sær at fara á børsin í London tíðliga í hesum árinum og selja partabrøv fyri umleið 180 mill. kr. Tað er so eisini í tøkum tíma, tí um fáar mánaðir skal felagið til at bora á føroyska landgrunninum og til ta uppgávuna skulu nógvir pengar á borðið.



# Føroya Kolvetni til reiðar at finna semju

**Føroya Kolvetni hevur altíð verið til reiðar at koma til eina semju. Men Sagex er ikki nøgt við semingsuppskotið, og krevur umframt fult endurgjald sambært sáttmálanum, eisini eina ávísa nøgd av partabrøvum í Føroya Kolvetni til sera lágar prísir. Hetta halda vit í Føroya Kolvetni ikki vera rímiligt sigur nevndarformaðurin Graham Stewart**

OLJUFELØG Í HORNATØKUM
*Jan Müller*



*Terje Hagevang, stjóri í Sagex her saman við Graham Stewart, nevndarformanni og Nils Sørensen, stjóra í Føroya Kolvetni, áðrenn rættarmál løgdu forðingar fyri samstarvinum*
*Mynd Jan Müller*

Ein partur av tí stuttu søguni hjá Føroya Kolvetni er tað samstarv, felagið hevur havt við norska oljuráðgevingarfelagið Sagex Petroleum, sum fekk

trupulleikar av Norsk Hydro, ið stevndi Sagex fáar dagar fyri, at Føroya Kolvetni skuldi lata sína umsókn inn um loyvi at leita eftir olju undir Føroyum. Sagex noyddist tá at pakka saman í Føroyum; men søgan um Føroya Kolvetni og Sagex Petroleum er ikki liðug enn.

Nú Sagex er farið í rættin í Oslo við krøvum móti Føroya Kolvetni hava vit hava heitt á nevndarformannin í Føroya Kolvetni, Graham Stewart, um at siga sína hugsan um hetta samstarvið, sum byrjaði so væl, og sum er endað í rættinum og í ringasta føri kann kosta føroyska oljufelagnum nógvar pengar.

Graham Stewart sigur, at avtalan, ið varð undirskrivað í februar 2000, gjørdi Sagex til tekniskan ráðgeva hjá Føroya Kolvetni; men longu í mai 2000 hevði Norsk Hydro lagt fútaforboð ímóti teimum. Fútaforboðið bar við sær, at

Sagex ikki kundi arbeiða víðari fyri Føroya Kolvetni. Skuldi Føroya Kolvetni luttaka í fyrsta loyvisumfarinum, metti tað seg ongan annan møguleika hava enn at slíta avtaluna við Sagex. Hendan avgerðin hevur ført til, at Sagex hevur kravt endurgjald frá Føroya Kolvetni, og av tí at partarnir ikki eru komnir til eina semju, hevur Sagex tikið upp sakarmál ímóti felagnum.

Sagex var stovnað av fyrrverandi Saga Petroleum monnum, ið høvdu drúgvar royndir innan føroyska jarðfrøði. Graham Stewart og hini oddafólkini í Føroya Kolvetni høvdu tí havt stórar vónir um samstarvið við Sagex, sum byrjaði í 2000.

Graham Stewart vísir á, at hóast álvarsligu trupulleikarnar, sum Føroya Kolvetni fekk av stríðnum millum Norsk Hydro og Sagex, eydnaðist tað felagnum síðani at samráða seg inn í ein bólk, ið fekk tillutað loyvi í fyrsta føroyska loyvisumfarinum. Nevndarformaðurin í Føroya Kolvetni sigur víðari, at hóast Sagex hevði arbeitt í umleið ein fjóðring av avtalaða tíðarskeiðnum fyri Føroya Kolvetni, hevur Føroya Kolvetni tó altíð verið til reiðar at koma til eina rímiliga semju. Men Sagex er ikki nøgt við semingsuppskotið, og krevur umframt fult endurgjald sambært eitt-ára sáttmálanum eisini eina ávísa nøgd av partabrøvum í Føroya Kolvetni til sera lágar prísir. Hetta metur Føroya Kolvetni ikki vera rímiligt.

Sakin koyrir nú sína gongd í býrættinum í Oslo, og verður væntandi tikin til dóms til heystar, um ikki ein semja er funnin áðrenn, sigur Graham Stewart í viðmerkingini til málið. Hann ynskir ikki at gera aðrar viðmerkingar, soleiðis sum støðan er í løtuni.

# Fyrsta føroyska felagið á altjóða virðisbrævamarknaðin

**Hendingarnar í New York 11. september ávirkaðu allan fíggjarmarknaðin kring heimin og kom hetta eisini at ávirka ætlaninar hjá føroyska oljufelagnum, FØROYA KOLVETNI at fara á børsin í London eftir partapeningi til leitingina á landgrunninum. Nú fyrireikar felagið seg sum fyrsta føroyska felagið nakrantíð at fara á børsin í London at fíggja sítt framtíðar virksemi. Ætlanin er at selja partabrøv fyri 180 mill. kr.**

OLJUFELAG OG PARTAPENINGUR
*Jan Müller*



*Graham Stewart, nevndarformaður og Nils Sørensen, stjóri her á oljuráðstevnu í Stavanger. Loksins verða ætlanir teirra um at fara á børsin í London at útvega partapening til komandi boring til veruleika*
*Mynd Jan Müller*

Tað er ikki bert úti í tí stóru verð, at hendingarnar í New York tann 11. september hava havt sína ávirkan. Í sambandi við verkætlaninar, sum Føroya Kolvetni hevur saman við Agip á føroyskum øki, var felagið í ferð við at fremja eina partapeningahækkan. Henda skuldi fara fram á AIM (Alternative Investment Market), á London Stock Exchange í seinra helmingi av oktober mánaða 2001. Henda stóra verkætlan varð løgd til rættis saman við stóra enska íløgubankanum Old Mutual Securities í London, sum frammanundan hevur verið við til at vegleiða fleiri onnur oljufeløg í at fáa fatur á altjóða partapeningi.

Síðsta hond varð løgd á fyrireikingarnar, og alt var klárt; men fíggjarmarknaðurin var sum lammaður eftir hendingarnar tann 11. september, so eftir ráðum frá serfrøðingum á økinum varð avgjørt at útseta ætlanina, til marknaðurin aftur varð til reiðar. Mett varð at fíggjarmarknaðurin kemur aftur í rættlag fyrsta ársfjórðing 2002.

Sosialurin hevur spurt seg fyri hjá felagnum, hvussu verður við umrøddu partafelagstekning. Graham Stewart, nevndarformaður sigur við blaðið, at ætlanin er at selja partabrøv fyri upp ímóti 15 mill. pund ella umleið 180 mill. kr, fyri at felagið kann fíggja sin part av útreiðslunum í sambandi við verkætlaninar. Føroya Kolvetni hevur í dag 7% av tveimum føroyskum leitiloyvum saman við Agip, ið hevur hini 93%, men hevur avgjørt at brúka sína optión og fara upp til 22%.

Graham Stewart upplýsir, at arbeiðið við at leggja til rættis hesa partabrævahækkan hevur verið spennandi men ikki uttan trupulleikar, av tí at føroysk og ensk fíggjar- og lógarumhvørvi skulu samskipast í eitt prospekt til møguligar íleggjarar. Føroya Kolvetni hevur tí eisini fylgt væl við í málinum um tann føroyska partabrævamarknaðin, sum tað vónar kemur at virka í vár. Ætlanin er, at partabrøv hjá Føroya Kolvetni skulu kunna keypast og seljast á hesum marknaði, so skjótt sum hann er klárur. Higartil hevur felagið einar 200 føroyskar íleggjarar.